# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ole Jacob og Sjúrður í Smiðjuni

**Fríggjadagin lat ein framsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað eru teir báðir Ole Jacob Nielsen og Sjúrður Poulsen, sum sýna fram føroyska trælist.**



*Sjúrður Poulsen og Ole Jacob Nielsen í Smiðjuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ole Jacob er 60 ára gamal og útbúgvin lærari. Hann var lærari á Toftum frá 1967-72 og síðan 1972 á Sankta Frans Skúla í Havn.

Hann hevur í fleiri ár havt framsýningar við brúkslutum, sum hann hevur skorið úr træ.

Hann hevur verið á fleiri skeiðum í smíði, myndaskurði, dreying og eldsmíði. Ole Jacob er listamaður og arbeiðir við myndaskurði og serliga trædreying. Hann hevur gjørt ein faldara, sum hann kallar "Føroysk trælist".

Í hesum faldaranum skrivar hann m.a., at hann hevur fingist við at telgja alt sítt lív. Síðan miðskeiðis í 70-unum hevur hann skorið og dreyað list- og prýðislutir úr føroyskum viði, og hevur hann sum frá leið sæð møguleikarnar fjølgast og ríkast. Hyggur tú sum listamaður at viði, leita eygu tíni oftast eftir tí, sum snikkarin vildi vrakað.

Ole Jacob er kanska serliga kendur fyri sínar lampuskermar úr træ. Um hetta sigur hann, at tá tú skalt dreya heilt tunt, er vanligt at nýta ljós til at meta røttu tjúkdina á trænum. Tann uppliving tú fært tá ið ljósið eins og opnar innara lívið í viðinum fyri tær, vilt tú fegin varðveita. Haðani kom hugskotið um at dreya lampuskermar úr heilum viði. Hann ger eisini skálir, stakar og annað úr føroyskum viði.

Hin listamaður sum sýnir fram er Sjúrður Poulsen, hann er eisini læraralærdur.

Sjúrður, sum er 72 ára gamal, tók prógv sum møbilsnikkari í 1955 og lærarAprógv í 1960 og prógv sum faklærari í jarn- og træsmíði á Statens Sløjdlærerskole í 1972.

Hann hevur verið lærari í Skopun, í Tórshavnar Kommunuskúla og á Venjingarskúlanum. Hann hevur undirvíst í metal- og træsmíði á Føroya Læraraskúla síðan 1970, og hóast hann fór frá sum lærari í 1997, hevur hann framvegis eftirútbúgvingarskeið á skúlanum.

Nú hevur Sjúrður betri stundir til tað, sum hann hevur størstan áhuga fyri, tað er at gera skreytlutir úr hornum og beinum. Hann ger t.d. armbond, slipsnálir og lampur. Sum nakað heilt nýtt hevur hann gjørt eina lampu úr horni og træ.

Alt hetta er at síggja á framsýningini, sum er opin til mikudagin.

## Prógv sum sálarfrøðingur



10. december 2003 hevur Magnus Hansen í Porkeri lokið prógv sum sálarfrøðingur (cand pæd psyk) á Danmarks Pædagogiske Universitet í Keypmannahavn.

Magnus tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1976, var lærari tvey ár í Hvalba og hevur starvast í Vági síðan 1978. Hann byrjaði lesturin á heysti 1998 og fekk PD prógv í sálarfrøði í 1999. Hann fór undir aftur cand pæd lesturin á heysti í 2000, men til jóla hetta árið heitti Mentamálastýrið á hann um fyribils at vera skúlastjóri í Sernámsdeplinum í eitt ár. Hetta bleiv so til tvey ár, men seinasta summar segði hann seg úr hesum starvinum fyri at gera seg lidnan við lesturin. Hann starvast nú aftur sum lærari í Vágs skúla.

Umframt læraraprógv hevur Magnus eisini serlæraraprógv og tali- og hoyrilæraraprógv.

Rúni Hentze:

## Nýggjur fyristøðumaður á Ørkini

TÍÐINDASKRIV



Sjómansheimið Ørkin, sum er tað Føroyska Sjómansheimið í Reykjavík, hevur fingið nýggjan fyristøðumann.

Stýrið fyri Sjómansheimið Ørkina hevði fund í vikuni, har nýggjur fyristøðumaður var settur. Nýggi fyristøðumaðurin á Hotel Ørkini er Rúni Hentze úr Skopun, skipari og fyrrverandi løgtingsmaður. Rúni er 52 ára gamal giftur við Hildibeth. Tey eiga tríggjar gentur Torbjørg, Oda og Ingibjørg. Rúni er skipari og eigur og rekur tveir bátar Ingibjørg og Oddbjørg.

Rúni byrjar í nýggja starvinum í Reykjavík fyrst í komandi árið. Seinni fer konan Hildibeth eisini at starvast har.

Núverandi fyristøðumaðurin Jacob Hendrik Hansen, fer eftir egnum ynski frá sum fyristøðumaður 1. januar.

Nýggjur nevndarlimur er eisini valdur, tað er Jonhard Joensen av Skipanesi, sum er komin fyri Jóhan Olsen, sjómanstrúboðara, sum andaðist í summar.

Hotel Ørkin - Sjómansheimið í Reykjavík er sjálveigandi stovnur knýttur at Hini føroysku Sjómansmissiónini. Heimið, ið var tikið í nýtslu 1991, hevur 20 dupultkømur, matsal, fundarhøli o.a. og liggur mitt í býnum. Umframt føroyingar vitja eisini íslendingar og aðrir útlendingar heimið. Hvørja viku eru møtir og onnur tiltøk á sjómansheiminum. Dentur verður lagdur á eitt kristiligt heim við góðari tænastu í rúsfríum umhvørvi. Vitjað verður eisini umborð á skip, sum koma inn til Reykjavíkar ella har um vegir. Miðja verður eftir mest møguligt at hava føroysk starvsfólk á heiminum. Meira fæst at vita um Ørkina á www.hotel-orkin.com

## 8 nýggir maskinsmiðir



*Fríggjadagin var hugnaløta á Tekniska Skúla í Klaksvík, tá 8 ungir menn fingu handað sveinabræv sum maskinsmiðir.*
*Frá vinstru: Ragnar Nielsen, Oyndarfjørður, Jógvan Christiansen, Fuglafjørður, Trúgvi Hansen Nesá, Fuglafjørður, Poul Norðoy, Klaksvík, Leivur Justinussen, Skáli, Bogi Sivertsen, Klaksvík, Einar Hansen, Klaksvík, Árni Olgar Skorastein, Leirvík*

### Dagurin

**16. desember. Lázarus.** Vinmaðurin í Betaniu, sum Jesus vakti upp frá deyðum (Jóhs.kap.11). Ein halgisøga sigur, at hann seinni doyði friðarliga, ein onnur, at hann varð halshøgdur undir Domitianus keisara.



# UTTAN ÚR HEIMI



*Mynd: Reuters*

## Tað endaði sum tað byrjaði

**Virkisleiðin hjá Saddam Hussein endaði á sama hátt, sum hon byrjaði: Undir jørð**

SADDAM HUSSEIN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Til fyri fáum mánaðum síðani var ein framsýning undir tí stóra hermannaminnisvarðanum í Bagdad, sum lýsti lív og verk hjá táverandi forsetanum. Á einum ásýniligum staði stóð ein gomul skrivimaskina. Hon var vápnið, sum tann ungi Saddam Hussein nýtti, tá hann í loyndum fór undir virksemi sítt ímóti táverandi stýrinum í Irak.

Hann byrjaði sítt politiska lív undir jørð, og tí var tað kanska hóskandi, at hann nú varð funnin og tikin í einari holu nakrar kilometrar frá bygdini Al-Awja, har Saddam Hussein al-Tikriti varð borin í heim fyri 66 árum síðani.

Í hesum tíðarskeiðinum skipaði hann eitt av heimsins mest harðrendu og eirindaleysu stýrum, hvør illgerðir vit framvegis ikki hava fult yvirlit yvir. Hetta var eisini eitt stýri, har Saddam sjálvur í størri og størri mun gjørdist miðdepilin saman við sínum næstu og skyldfólki sínum úr økinum við Tikrit.

Tað var ein av hesum skyldmonnunum, generalurin Hassan al-Bakr, sum hjálpti honum framat, tá generalurin í 1968 tók valdið í Bath-flokkinum.

Stig fyri stig eydnaðist tað Saddam Hussein at fáa størri og størri ávirkan og vald, og hann helt seg ikki aftur, var tað neyðugt at beina fyri onkrum, sum forðaði honum. Í 1979 tók hann tað endaliga stigið, tá hann gjørdist forseti, forsætisráðharri, aðalskrivari í flokkinum, formaður í kollveltingarráðnum og ovasti fyri landsins herdeildum. Tað skuldi skjótt vísa seg, at hann dugdi betur at halda eygað við landi og fólki enn at stýra.

### Mistøk

Longu árið eftir at hann var komin framat, gjørdi hann tað fyrsta mistakið, tá hann leyp á grannalandið Iran - eitt kríggj, sum vardi heili átta ár, og sum oyðilegði land hansara. Tá tað endiliga eydnaðist at fáa vápnahvíld í lag, lá irakski búskapurin í sori.

Tvey ár seinni, í august í 1990, gjørdi hann aftur eitt stórt mistak. Eftir at hava keglast við Kuwait um oljurættindi og landaøki gjørdi Saddam Hussein av at leypa á tað lítla grannalandið og at innlima tað í Irak. Altjóða samfelagið tók seg saman, og undir amerikanskari leiðslu rak ein altjóða herur irakska herin úr Kuwait á vári í1991.

Ósigurin í Kuwait og tey strongu altjóða tiltøkini ímóti Irak gjørdust byrjanin til endan hjá Saddam Hussein. Kortini eydnaðist tað honum í tólv ár afturat at gera seg inn á fólkið við hjálp frá herinum og løgregluni, fongsli og píning, morðum og hópdrápum.

Nú situr hann sjálvur aftan fyri rimarnar.

## Fær viðferð sum krígsfangi

**Saddam Hussein verður mettur sum krígsfangi samabært Geneve-sáttmálunum, sigur amerikanski verjumálaráðharrin**

SADDAM HUSSEIN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Saddam Hussein var ikki meiri enn tikin, tá amerikanski forsetin, George W. Bush, kunngjørdi, at gamli irakski leiðarin verður drigin til svars fyri gerðir sínar. Men hann vildi ikki siga, nær og hvar tað verður gjørt.

Stutt eftir segði Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, at Saddam Hussein verður mettur sum krígsfangi, og at hann fær ta viðferð, sum ásett er í Geneve-sáttmálunum um krígsfangar. Um tað merkir, at hann formliga verður skrásettur sum krígsfangi, vildi ráðharrin ikki siga.

Irakska stjórnarráðið í Bagdad krevur gamla einaræðisharran fyri ein krígsbrotsmannadómstól, sum ráðið ætlar at skipa. Abdel Aziz al-Hakim, sum er formaður í stjórnarráðnum, segði í París sunnukvøldið, at irakar skulu sjálvir døma Saddam Hussein.

Men altjóða serfrøðingar í revsirætti ivast í, um ein nýskipaður irakskur krígsbrotsmannadómstólur hevur tað neyðuga løgfrøðiliga grundstøðið, og at dómararnir kunnu metast at vera óheftir.

Bretska stjórnin gjørdi longu sunnudagin vart við, at hon góðtekur ikki, at Saddam Hussein verður dømdur til deyða.

Einstakir evropeiskir politikarar hava skotið upp, at Saddam Hussein kemur fyri altjóða krígsbrotsmannadómstólin í Haag, men tað verður ikki hildið, at amerikanararnir fara at góðtaka tað.